# NEI, OKKARA BØRN DUGA IKKI ALT

## – billið teimum ikki tað inn!

**VIRÐISGRUNDARLAGIÐ** HJÁ TEIMUM **YNGRU** FÆR ELDRA **ÆTTARLIÐIÐ** AT HIMPRAST. Í **DANMARK** HEVUR VERIÐ HVAST **ORÐASKIFTI** UM **BARNAUPPALING** SEINASTU **MÁNAÐIRNAR**. NIÐURSTØÐAN ER **GREIÐ**. FORELDUR SETA IKKI **MØRK** OG BILLA **BØRNUNUM** INN, AT TEY DUGA **ALT**



BØRN

Uni Holm Johannesen
uni@sosialurin.fo

Foreldur skulu sjálvsagt hjúkla um síni børn, leggur Peter Aalbæk Jensen varisliga fyri. Hann hugsar seg um eina løtu. Ressast við og brúkar orkuna. Hvassoygdur á málinum.

Tað er eisini teirra uppgáva at brynja síni børn at stíga út í heimin. Foreldur skulu fyrireika børnini at handfara mótburð og gera púra greitt, at lívið er ikki ein dansur á rósum. Eingin verður borin á løgvum. Fólk traðka á teg. Spýta á teg. Finnast at tær. Tað hava tannáringarnir ikki hóming av í dag. Tú noyðist at bretta upp ermar, brestur burtur úr honum, nærmast í sama andarhaldi.

Tað hevur verið hvast orðaskifti um barnauppaling í Danmark seinastu mánaðirnar. Bólturin fór á rull, tá bersøgni Thomas Blachman filtist at donskum foreldrum, sum renna undan sínari ábyrgd. Skalluti tónleikarin segði í almenna sjónvarpinum, at tannáringar í dag hava onga fatan av, hvørjar avbjóðingar bíða teimum. Orsøkin er, sambært honum, curling-foreldruni, sum sópa samfullar trupulleikar hjá børnunum burtur. Foreldruni hava frá barnsbeini kínt sínum børnum um ryggin og sagt, at tey duga alt. Úrslitið er eitt egoistiskt ættarlið, sum droymir um persónliga eydnu og viðurkenning, uttan at hava minstu hóming av, hvat krevst fyri at røkka tindinum. Ættarlið Y, sum er spjaldrið, børnini fáa hongt um hálsin, eru børn og tannáringar í einum ríkum materialistiskum samfelag. Ekkaleysir lívsnjótarar og tryggheitsnarkomanar, sum ongantíð klippa nalvastrongin frá foreldrunum, eru skoðsmálini. Virðisgrundarlagið hjá ættarlið Y fær eldra ættarliðið at himprast.

Fleiri hava tikið blaðið frá munninum. Pernille Vigsø Bagge er framsøgukvinna í familjumálum hjá Socialistisk Folkeparti. Hon tekur undir við atfinningunum, at tað eru fleiri foreldur, sum ikki røkja sína skyldu.

Vit skulu læra børnini at gera sær ómak, um tey vilja verða dugnalig. Vit skulu læra børnini, at tú skal venja sera nógv, um tú vil verða best, sigur hon, sambært religion.dk.

Peter Aalbæk Jensen tekur undir.

Feskastu dømini eru børnini, sum ósmæðin bjóða seg fram í sjónvarpssendingunum X-Factor og Talent. Sannførd um, at tey eru í heimselituni eftir einum vikuskifti. Tilgongdin hjá seriøsum tónleikarum er 10 til 15 ár fyri at røkka tindunum. Tað hava børnini ikki peiling av. Eftir at hava gjørt sær fullkomiliga fyri skommum í almennum sjónvarpi, fata tey, at hatta duga tey ikki. Tað eru foreldruni, sum skulu siga sínum børnum tað. Ikki eg ella Thomas Blachman, sigur hann.

### Bersøgin dómari

54 ára gamli Peter Aalbæk Jensen er pápi at trimum børnum og filmsframleiðari. Hann og Lars Von Trier, leikstjóri, stovnaðu filmsfelagið Zentropa í 1992, og síðani hava teir framleitt eina rúgvu av vælumtóktum donskum spælifilmum. »Ålen«, sum hann eisini verður róptur, hevur verið almennur persónur í Danmark í nógv ár. Hann fekk Bodil-virðisløn fyri sítt stóra arbeiði til frama fyri donsku filmsvinnuni í 2001.

Millum føroyingar er hann helst best kendur fyri sín leiklut sum kensluleysi og bersøgni dómarin í Talent 2008. Leisturin at viðfara allar luttakarnar eins, líkamikið um tað var ein spastiskur dansari, ein lítil genta ella ein vaksin maður, fekk fleiri at øtast við. Hann var ikki mjúkur at strúka. »Du ligner kraftedeme en død fisk i hovedet, mens du spiller« og »når I står der, da får jeg sgu lyst til at afsikre mit haglgevær« vóru millum skoðsmálini, nøkur vónrík og brosandi børn fingu við sær á lívsleiðini frá Peter Aalbæk Jensen.

Sum dómari fekk hann sjálvur at sanna, at børnini tykjast ikki at vita, at einki kemur av sær sjálvum.

Lívið er ein dystur, har tú fær fleiri fúlar undir vangan. Tú tapir fleiri dystir í lívsins dysti. Dugir tú ikki at handfara tær støðurnar, hevur tú ongan møguleika at standa teg. Foreldur skulu brynja og fyrireika síni børn til tann mótburðin. Tað gert tú millum annað við at gera teimum greitt, at hatta dugir tú, og hatta dugir tú ikki. Børnini skulu læra at reisa seg aftur. Hvør er dugnaligur, uttan at hava grátið?, spyr hann.

Lisbeth Zornig Andersen er forkvinna í danska Barnaráðnum. Hon hevur átt virknan leiklut í kjakinum um uppaling. Hon heldur, at tað er torført at skyna ímillum javnvágina við kærleika og at siga tað bart út.

Sig sannleikan, men við kærleika, er hennara greiði boðskapur til foreldur í klummu á heimasíðuni boerneraadet.dk.

Stórar broytingar hava verið í umbúna seinastu áratíggjuni. Konufólk eru meira virkin á arbeiðsmarknaðinum í dag, og stórur partur av barnauppalingini fer fram á stovnum uttan fyri heimið. Tað er eingin umbering, heldur Peter Aalbæk Jensen.

Gamaní, men skalt tú vera foreldur, so skal tað vera heilhugað. Kann tú ikki tað, so lat vera, sigur hann.

### Eyðmjúk

Pernille Vigsø Bagge, framsøgukvinna í familjumálum hjá Socialstisk Folkepart, hevur greiða støðu. Tað er alneyðugt at varpa ljós eyðmjúku børnini og uppgávuna hjá foreldrunum.

Foreldur tykjast hava gloymt sín leiklut í lívunum hjá børnunum, sigur hon.

Peter Aalbæk Jensen leggur áherðslu á, at børn kenna ikki sítt pláss.

– Tá eg eri í føðingardag, er tað altíð ein smádrongur ella ein smágenta, sum skulu gera vart við seg. Rópa og skrála. Eg sakni eitt vanligt smædni, sum ger, at børn taka orðið, tá tey hava nakað upp á hjartað, sigur hann.